Øll eiga eyka møguleika

Hóast FM kappingarnar eru avjgørdar, so verður tað sagt at vera bjarging í kiksaðum róðrarári, um tað eydnast at vinna á Ólavsøku

ÓLAVSØKURÓÐRUIN
Jóannes Hansen

Ólavsøkuróðurin í dag er endabresturin á einum spennandi kappróðrarári

mynd: Álvur Haraldsen

Í dag er fyri fyrstu ferð nakrantið sjeyndi FM róðurin á skránni. Ongantíð áður hevur ólavsøkuróðurin verið meiri enn sætta FM kappingin.

Í flestu kappingunum er tað greitt, hvør verður meistari. Blikur hevur vunnið dreingjakappingina, Jarnbardur kvinnukappingina, Sundabáturin manskappingina millum 6-mannaførini, og Argjabáturin hevur vunnið kappingina millum 8-mannaførini.

Umframt í kappingini millum 10-mannaførini er tað framvegis kapping um FM millum gentumanningarnar. Sílið er við 33 stigum stórfavorittur, men Blikur hevur við 29 stigum møguleikan, um tað lagar seg væl til teirra fyrimun. Á Vestanstevnuni vann Firvaldur. Tvørágentur vóru tvey sekund frammanfyri Sílið. Munurin frá nummar tvey og til nummar sjey var bara eitt stórt sekund. Blikur misti oddasessin í FM kappingini, tí argjagenturnar endaðu á sætta plássi og fingu tískil bara eitt stig í Sørvági.

Eingin ivi er um, at Sílið er stórfavorittur, men úrslitið í Sørvági vísti, at tað er møguleiki fyri, at á Ólavsøku kann tað, sum hevur vent niður, fara at venda upp.

Jarnbardur við kvinnum og Argjabáturin hava vunnið allar róðrarnar og kappast um Útvarpssteypið. Vit hava áður vístá, at tað átti at verið ein objektivari máti enn nú at gjørt av, hvør skal hava steypið, tá ið tað stendur á jøvnum. Tað halda vit framvegis.

Serligt á Ólavsøku

Felags fyri allar 57 manningarnar, sum rógva á Ólavsøku, er, at tær droyma um at enda róðrarárið við maner. At vinna ársins síðsta róður frammanfyri fleiri túsund áskoðarum, at taka ímóti steypi og gullkrónum á Bursatanga, og í tveir dagar at ganga í Havnargøtum og spekka sær sum vinnari, tað verður roknað sum nakað heilt serligt. Ofta hevur tað verið sammett við sigur í steypakappingini í bóltkappingunum.

Hjá teimum, sum vinna FM, kennist sigurin uppaftur trivaligari, um hesar manningarnar vinna á Ólavsøku eisini, og hjá hinum manningunum er tað stórur uppmuntringur, sum kanska gevur mót og dirvi um at halda fram at rógva eitt ár afturat, um tað eydnast at vinna á Ólavsøku.

Í dag verður punktum sett fyri róðrarárið. Hjá nógvum hevur kappróður verið á skránni síðani stutt eftir ársskiftið. Fyrst varð vant í maskinum og í túnum og á teigum, og síðani fyrst í apríl hevur verið togað í árarnar. Seinnapartin í dag verða allar árar lagdar í sjógv, og eftir fýra minuttum ella gott tað, verður avgjørt, hvør skal sóla sær í gulli og skreyti, og hvør skal kenna seg eyka móðan, tí tað ikki eydnaðist so væl.

Tíðirnar

Óføru hagtølini á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag siga okkum, hvør hevur róð teinin av Argjahøvda og fram við Molanum og inn undir Skipafelagið skjótast í teimum ymsu kappingunum. Tað eigur at havast í huga, at fasti starturin hevur verið nýttur síðani 1979. Frammanundan var leysur startur. Tí kann eitt sindur av elastikki vera í tíðunum, sum eru frammanundan 1979.

Í kappingini millum 5-mannaførini við dreingjamanningum eigur Junkarin metið. Í 1975 róðu teir ólavsøkumálið í tíðini 4.27.40. So skjótt hevur eingin annar róð hetta málið.

Í kappingini millum 6-mannaførini við kvinnum eigur FM vinnarin í ár metið. Í 1995 róði Jarnbardur málið í tíðini 4.21.12.

Bestu tíðina í kappingini millum gentumanningarnar eigur Aldan. Í 1981 var tíðin hjá henni 4.38.40.

Sølmundur eigur bestu tíðina í kappingini millum 6-mannafør við monnum. Í 1983 var tíðin hjá teimum 4.15.40.

Ørvur eigur metið í kappingini millum 8-mannafør. Í 1999 róði Ørvur teir 901,35 metrarnar í tíðini 4.03.21.

Besta tíðin í kappingini millum 10-mannaførini er framvegis tann hjá Skálabátinum í 1992. Hon er 3.52.00.

Heksaskot hevur argað nólsoyingar

Nú er greitt, at toftimaðurin, sum í eina lítla viku ikki kundi venja, verður við í morgin. Heksaskotið er burtur, men fyri at einki skal henda undir róðrinum, verður blokada løgd, og nólsoyingar undirstrika dyggiliga, at teir hava fingið serkøna útsøgn um, at hetta hevur einki við doping at gera

FM FAVORITTURIN
Jóannes Hansen

Í Nólsoy og millum viðhaldsfólkini hjá Nólsoyinginum hevur tað verið fylgt serliga væl við fyrireikingunum til ólavsøkuróðurin. Tíðliga í síðstu viku varð annar av toftimonnunum, Aksel Joensen, raktur av heksaskoti. Tað hevði við sær, at tað var neyðugt at fáa eykamann at venja við alla síðstu viku.

Nólsoyingar vildu minst av øllum missa Aksel Joensen. Hann var fyrstu ferð við í 1993. Tvey ár var hann á flatlondum. Í 1997 luttók Nólsoyingurin ikki. Øll hini árini hevur Aksel sitið á toftibekki.

Bátsformaðurin, Nicolaj Falck, gevur toftimanninum, sum teir hava ivast so nógv í seinastu dagarnar, hetta skoðsmálið:

- Aksel vilja vit fyri alt í verðini ikki vera fyri uttan. Hann er álitismaðurin fram um allar aðrar. Vit lurta serliga eftir honum. Tað gera vit, táið vit leggja til startin, og drúgvu royndirnar hjá honum gera, at hann veit betri enn við aðrir, hvussu tað stendur til undir róðrinum.

Verður Aksel so umborð, táið tit í morgin fara at leggja til undir Argjahøvda?

- Hann hevur verið til intensiva viðgerð, síðani hann varð skaddur, og tað hevur hjálpt. Tá ið vit sunnudagin vandu fyri síðstu ferð í ár, var Aksel við, og hann segði seg standa royndina. Vit vilja heilt útihýsa møguleikanum fyri, at heksaskotið vitjar aftur undir róðrinum í morgin. Tí er avrátt, at læknin skal leggja eina blokadu í morgin. Tað vil siga, at um tað skuldi borið soleiðis á, at skaðin vitjaði aftur, so fer hann einki at kenna til hansara fyrrenn eftir róðurin. Teir siga, at hetta er ikki óvanligt, og tað er meiri enn so komið fyri, at kapprógvarar hava fingið blokadu.

Tað verður so nógv tosað um doping. Tit kvíga ikki fyri, at onkur skal siga, at týdningarmikli maðurin hjá tykkum verður dopaður í morgin?

- Tað hava vit sjálvandi hugsað um. Vit hava spurt okkum fyri hjá serkunnleikanum, og vit hava fingið at vita, at hetta hevur einki við sovorðið at gera. Um illa fer at vilja til, so fer tað at ganga út yvir Aksel sjálvan aftaná róðurin, men hann hevur sjálvur tikið avgerðina um, at soleiðis skal tað vera, og tað eru vit allir fegnir um, sigur Nicolaj Falck, bátsformaður umborð á Nólsoyinginum.

Havnarmenn skikka sær øðrvísi enn hinir

Tá ið tað ber til hjá svimjarum at seta met bæði á morgni og kvøldi, so halda teir umborð á Havnarbátinum, at tað eisini kann bera til hjá einum kappróðrarbáti at hava stutt millum venjing og kapping

OUTSIDARIN
Jóannes Hansen

Spennandi verður at síggja, um teir umborð á Havnarbátinum fara at hava nakað at fegnast um eftir ólavsøkuróðurin í dag.

Mynd: Álvur Haraldsen

Flestu kappróðrarbátarnir gjørdu síðstu venjingina burturav sær í vikuskiftinum. Summir vandu síðstu ferð leygardagin, og aðrir vandu síðstu ferð sunnudagin.

Eitt av undantøkunum er Havnarbáturin. Fríggjakvøldið var manningin á Havnarbátinum saman við hinum róðrarfólkunum hjá Havnar Róðrarfelag útferð kring Hestoy, og tey vitjaðu eisini í Hest bygd. Í vikuskiftinum vandu teir, mánakvøldið vóru teir við í hugnakvøldinum, sum Havnar Róðrarfelag hevur undan øllum stevnunum, men í gjárkvøldið løgdu teir til brots aftur at venja.

- Vit fara at rógva ein trivaligan túr, og so fara vit eisini at venja eitt sindur í intervallum, segði Magni Brøðraberg, áðrenn hetta blaðið fór til prentingar.

Hvussu ber tað til, at tit í hesum hava øðrvísi upplegg enn hini 10-mannaførini?

- Undanfarnu árini hava vit hvílt tveir teir síðstu dagarnar undan kappingunum. Í ár hava vit vant bæði hóskvøld og fríggjakvøld, tá ið vit hava kappast leygardag. Og undan Ólavsøkuni hava vit ikki viljað broytt hetta.

Men eru tit eins væl fyri, sum hinar manningarnar eru?

- Vit hava valt at royna hetta, tí vit halda, at tað kanska er eins gott og betri. Í svimjikappingum verður kappast í innleiðandi fyrrapartarnar og um kvøldarnar eru finalurnar. Tað kemur ofta fyri, at met verða sett í finalunum. Tá ið svimjarar kunnu betra tíðirnar, so skjótt aftaná, at teir hava kappast, so halda vit, at tað eisini eigur at bera til í kappróðrinum. Tí royna vit hetta í ár, sigur Magni Brøðraberg, bátsformaður umborð á Havnarbátinum.

Fyrireiking til seinnu hálvu

Venjarin hjá B68, Trygvi Mortensen, dylur ikki fyri, at UEFA-Cup dysturin móti lettiska Ventspils í morgin verður mettur sum ein liður í fyrireikingunum til seinnu hálvu av landskappingini

UEFA-CUP
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Herbert í Lon Jacobsen, sum her er avmyndaður í fyrra dystin millum B68 og Ventspils, verður neyvan at síggja aftur á B68-liðnum fyrr enn móti kappingarenda

mynd: Jens Kr. Vang

Í morgin fyrrapartin fer eitt flogfar hjá Atlantsflog úr Vágum við kós móti Letlandi. Umborð á flogfarinum eru bestu manningarnar hjá ávíkavist B68 og B36, sum sama dag skulu royna seg í UEFA-Cup dysti í Letlandi. B36 skal, sum vit umrøddu í blaðnum í gjár, royna seg móti Metalurgs, meðan toftamenn skulu í dyst móti Ventspils.

Ikki óseriøst

Trygvi Mortensen, venjari hjá B68, sigur, at teir hava so at siga allar mans tøkar. Sterki verjuleikarin Herbert í Lon Jacobsen breyt eitt bein í fótinum í fyrra dystinum móti lettunum á Svangaskarði fyri tveimum vikum síðani, og hann verður neyvan tøkur aftur fyrr enn móti kappingarenda í ár, sigur B68-venjarin. Eisini er Mikkjal Thomassen, sum heldur ikki var við í fyrra dystinum, framvegis skaddur, men burtursað frá teimum báðum løgreglumonnunum eru allir mans hjá B68 tøkir.

Spurdur um tað ikki er óseriøst av B68 og B36 ikki at fara til Letlands fyrr enn á sjálvum leikdegnum, sigur Trygvi Mortensen, at tað metir hann ikki. – Vit vænta ikki at vinna dystin, og í okkara eygum er dysturin meiri ein fyrireiking til fyrsta dystin í seinnu hálvu av landskappingini móti KÍ. Nú taptu vit 0-3 á heimavølli, men høvdu vit kanska vunnið 1-0, so er væl hugsandi, at vit fóru avstað nakrar dagar frammanundan, sigur Trygvi Mortensen.

At tað eisini er ein stór fíggjarlig sparing hjá feløgunum við at fara avstað á sjálvum leikdegnum, sigur seg sjálvt, og tað er eisini vert at hava í huga, heldur Trygvi Mortensen. Hann greiðir frá, at toftamenn sjálvir hava mat við til ferðina, soleiðis at teir ikki eru í vanda fyri at fáa onkran fremmandan mat úr Letlandi, sum møguligani kann fáa onkrar leikarar at kenna seg illa fyri. Í mun til B36, sum skal spæla einans sjey kilometrar frá flogvøllinum, skulu toftamenn koyra einar 120 kilometrar við bussi til teirra leikstað, sigur venjarin hjá B68.

Væntar stórt trýst

Sjálvur var Trygvi Mortensen ikki til staðar, tá ið B68 leikti fyrra dystin móti Ventspils, men hann hevur sæð dystin á sjónbandi. Út frá tí, sum hann hevur sæð, heldur hann, at Ventspils er eitt gott lið, sum spælir skjótan og tekniskan fótbólt. Hinvegin heldur Trygvi Mortensen, at lettarnir ikki eru serliga avgjørdir framman fyri málinum, tí teir høvdu eina rúgvu av málmøguleikum, sum vóru misnýttir, sigur venjarin hjá B68. – Okkara menn høvdu tó eisini sínar málmøguleikar, men tað eydnaðist ikki at gera sær dælt av hesum møguleikum.

B68-venjarin sigur seg vænta, at lettarnir fara at leggja eitt stórt trýst á toftamálið frá fyrsta bríklsi, men hann vónar samstundis, at Ventspils fer at lata summar av sínum bestu leikarum sita yvir, soleiðis at onkrir av vanligu eykaleikarunum sleppa framat. – Okkara útgangsstøði verður verjukent, og høvuðsendamálið hjá okkum verður at fáa leikferðina so langt niður sum gjørligt, sigur Trygvi Mortensen, sum vónar, at B68 fær eitt gott úrslit í dystinum, hóast tað fyrst og fremst er landskappingin, ið telur hjá toftamonnum.

Startrøðin til FM-róðurin á ólavsøku 2004

Mikudagin 28. juli fara 57 bátsmanningar at rógva síðsta FM-róðurin í ár. Harumframt vera eisini 18 barnamanningar við. Startrøðin verður henda:

5-mannafør, dreingir
1 Royndin Fríða
2 Svanur
3 Sílið 1G
4 Firvaldur
5 Spógvin
6 Fípan Fagra
7 Blikur
8 Havfrúgvin 1G
9 Tekla
10 Drekin
11 Tjaldrið 1G
12 Kollur 1G

5-mannafør, gentur
1 Dúgvan
2 Tjaldrið
3 Falkur
4 Junkarin
5 Blikur
6 Fípan Fagra
7 Sílið
8 Firvaldur 1G
9 Frúgvin
10 Havfrúgvin 1G
11 Drekin
12 Ørnin
13 Spógvin
14 Tekla

8-mannafør
1 Knørrur
2 Ørvur
3 Nevið Reyða
4 Argjabáturin
5 Kvívíkingur
6 Miðvingur 1G
7 Tofta Regin

Barnaróður, gentur
1 Blikur
2 Firvaldur
3 Dúgvan
4 Fípan Fagra
5 Tekla
6 Drekin
7 Ørnin
8 Royndin Fríða
9 Havfrúgvin
10 Spógvin
11 Tarvurin
12 Sílið

6-mannafør, kvinnur
1 Sølmundur
2 Gongurólvur
3 Páll Fangi
4 Jarnbardur
5 Lómur
6 Víkingur
7 Sundabáturin

6-mannafør, menn
1 Sandingur
2 Hósvíkingur
3 Víkingur 1G
4 Strálan
5 Jarnbardur
6 Sundabáturin
7 Gongurólvur 1G
8 Lómur
9 Sølmundur 1G
10 Hvessingur
11 Smyril

10-mannafør
1 Hoyvíkingur 1G
2 Eysturoyingur
3 Havnarbáturin 1G
4 Nólsoyingur
5 Vágbingur
6 Vestmenningur 1G

Barnaróður, dreingir
1 Junkarin
2 Royndin Fríða
3 Fípan Fagra
4 Sílið
5 Blikur
6 Firvaldur

Grindavík fekk eitt stig

Fram datt mánakvøldið eitt stig burtur frá bjargingini mánakvøldið, tá ið Grindavík fekk stig ímóti Fylkir

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Mánakvøldið var ein dystur í tólvta umfarinum í íslendsku landskappingini á skránni. Grindavík vitjaði Fylkir í Reykjavík. Úrslitið var 1-1, eftir at Grindavík hevði verið á odda. Síðstu tjúgu minuttirnar spældi heimaliðið við tiggju monnum, tí ein teirra varð vístur av vøllinum.

At Albert Sævarsson og liðfelagarnir fingu eitt stig hevði við sær, at Fram á næstaftasta plássinum er eitt stig longri frá bjargingini, enn teir vóru sunnudagin.

Sum tað varð sagt í blaðn-um í gjár, so vann Fram sunnukvøldið 4-0 á Akranesi. Í gjár varð nevnt, at føroyingarnir ikki vóru á liðnum hjá Fram. Hans Fróði Hansen var als ikki á vøllinum. Fróði Benjaminsen varð skiftur inn, tá ið tað vóru tjúgu minuttir eftir.

Edmund datt burtur ímillum

RÆTTING
Jóannes Hansen

Tá ið vit í blaðnum í gjár søgdu, at Jóannes Eidesgaard er sætti løgmaður, sum fer at handa Løgmanssteypið, síðani tað í 1989 varð farið undir at kappast um tað, so vóru løgmenninir nevndir. Teir eru Jógvan Sundstein, Atli P. Dam, Marita Petersen, Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg og so Jóannes Eidesgaard.

Á internetinum høvdu vit øll seks nøvnini. Í blaðútgávuni var eitt navn dottið burtur ímillum. Tað var Edmund Joensen. Hann var løgmaður frá 15. september 1994 og til 15. mai 1998. Hann handaði tískil Løgmanssteypið í 1995, 1996 og í 1997.

Vit biðja lesararnar og Edmund Joensen halda okkum til góða. Edmund er nú løgtingsformaður og fer tískil at ganga fremstur í skrúðgonguni fyrrapartin í morgin úr tinghúsinum og í Havnar kirkju og niðan aftur. Undir liðini á honum fara at ganga løgmaður og biskupur.